Grundgeving fyri val av ársins átaki

Føroyar eru eitt vatnland. Ella soleiðis følist tað í øllum førum fyri okkum, sum liva á hesum klettum, har regn og sirm er ein stórur partur av okkara veruleika. Umframt at tað ofta regnar á okkum, kóka vit okkum ofta vatn til ein drekkamunn, vit drekka vatn afturvið døgurðanum, og onkuntíð mugu vit eftir boðum frá myndugleikunum enntá kóka tað vatn, sum vit drekka afturvið døgurðanum. Vit svimja í vatni, vit baða okkum í vatni dagliga ella fleiri ferðir um vikuna. Vit eru umgyrd av vatni. Jú, Føroyar eru veruliga eitt vatnland.

Føroyar eru eisini eitt endurnýtsluland. Um skóleistarnir vóru hol, vórðu teir stoppaðir aftur, og gjørdist teir ov lítlir, arvaði tann næsti í røðini skóleistarnar, heldur enn at koyra teir vekk. Í roykstovuni var eldurin frá grúgvini ikki bara nýttur til at matgera, men eisini til at hita búfólkini, meðan tey sótu og karðaðu, spunnu og bundu skóleistar. Og tær fáu ferðirnar fólk sluppu í bað, varð baðivatnið brúkt ikki bara einaferð, men fleiri ferðir.

Sum samfelagið og fólk gerast ríkari, er tørvurin á endurnýtslu kanska minkaður, og í dag er tað vanligari at fólk koyra klæðir burtur, tá tey eru hol. Framvegis liggur tað tó nokk so djúpt í føroyinginum, at "hetta er ov gott at koyra burtur", og klæðir verða givin til Blákross, Reyða Kross og aðrar felagsskapir, sum syrgja fyri, at klæðini koma í umfar aftur antin í Føroyum ella aðrastaðni. Men listin yvir tað, sum er "ov gott at koyra burtur", burdi faktiskt verið nógv longri, enn hann er. Tí uttan at hugsa um tað, koyra vit hvønn dag okkurt burtur, sum kundi verðið endurnýtt.

Ársins Átak snýr seg bæði um vatn og um endurnýtslu. Og tað snýr seg um at endurnýta nakað av tí, sum er ov gott at koyra burtur. Áðrenn vit avdúka, hvat Ársins Átak er, er tað kanska vert at dvølja eina løtu við, hvat tað er, sum ger eitt gott átak til Ársins Átak. Tá Ársins Átak verður valt, má nógv orka brúkast uppá at definera, hvat tað er, sum ger hetta átakið meira vert at heiðra enn øll onnur átøk, sum eru í uppskoti. Í summum førum eru tað átøk, sum gera okkum meira effektiv. Í summum førum eru tað átøk, sum verja okkara umhvørvi og veðurlag. Í øðrum førum eru tað átøk, sum spara pengar. Og uppaftur í øðrum førum er tað bara ein genial uppfinning, sum er "born global" frá fyrsta degi.

Men tá man hevur verið allan listan ígjøgnum, kennir man fløvan av at hava valt rætt, tá man ásannar, at júst hetta átakið ger alt tað, sum varð nevnt. Ársins Átak í ár er ein uppfinning, sum ger okkum meira effektiv, sparir pengar, verjir okkara umhvørvi og veðurlag, og so hevur hon møguleika fyri at vera seld um allan heimin, um rætt verður atborðið og neyðuga áræðið og hepnið er til staðar.

Ársins Átak er ein hitavekslari, sum endurnýtir hita úr heita spillivatninum frá brúsunum til at hita tað kalda nýggja vatnið, áðrenn tað rennur inn aftur í ketilin og haðani inn aftur í brúsurnar. Fyritøkan handan hitavekslaran hevur installerað hitavekslaran nøkur støð her á landi, og er eisini á veg út um landoddarnar at selja vøruna. Fyritøkan bjóðar kundunum at keypa ella leiga hitavekslaran, og harvið verður fíggingarspurningurin ikki nakar trupulleiki, um man vil spara pening á hitarokninigini.

Dómsnevndin er samd við hesari fyritøkuni, at avlopshiti er ov gott at koyra burtur, og hevur dómsnevndin tí valt at heiðra fyritøkuna Defined Energy sum Ársins Átak 2015.